# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Minningarorð um
# Brian Vang

### En sang til min bror

Vers:
Man siger at længsel kun ta'r tid
citeret af folk som ik har prøvet at lid'
men du er bundet til mit sind
en mening findes selvom den er sværd at find'

Bridge:
Man si'r der er en mening med alt
har aldrig rigtig gjort noget brutalt
men det kan jeg gøre nu for gælden er betalt
gud hør mit råb for jeg har talt

Vers:
Nu er jeg ikke helt som før
tænker på ting hvor jeg burde sige eller gør'
Jeg fik jo aldrig sagt farvel
det er sgu svært at man tilgi' sig selv

Bridge:
At sige i mit hjerte du er
det nemmeste med mest besvær
håber du inderst inde vidste hvad jeg ment'
nu ved jeg man ska' tale før det forsent

Vers:
Dit minde fylder hvert minut
det gør så ondt at tænke på at det er slut
et liv med dig er nu forbi
du ringer ej og kommer ikke forbi

Bridge:
Men lykken kommer af og til
ser dit foto ser dit smil
men lykken skiftes ud med tårer på min kind
jeg trøstes at vi ska ses igen

Hilsen din bror Bent.

**80 ára føðingardagar**
Mánadagin 28. november fyllir Nancy Danberg 80 ár. Dagurin verður hildin leygardagin 26. november kl. 10.00-15.00 heima á Hoyvíksvegi 54.

Leygardagin 26. november verður Arnold Jacobsen, Klaksvík, 80 ár. Dagurin verður hildin heima frá kl. 10.00 til 16.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**75 ára føðingardagur**
Leygardagin 26. november verður Johild Jacobsen, Haldórsvík 75 ár. Dagurin verður hildin í Avhaldshúsinum í Haldórsvík frá kl. 18.00.

**50 ára føðingardagur**
Leygardagin 26. november verður Ása Olsen, forkvinna í Heilsuhjálparafelag Føroya 50 ár. Móttøka verður í heiminum á Berjabrekku 193, frá kl. 12.00-16.00.

**Diamantbrúdleyp**
Fríggjadagin 25. november hava Herborg og Svenning Danielsen, Kaldbak, diamantbrúdleyp. Dagurin verður hildin saman við børnunum við familju á Lágargarði.

28. november hava Elly og Frederik Joensen í Vági diamantbrúdleyp. Dagurin verður hildin leygardagin 26. november kl. 16.00-20.00 í hølunum hjá Frelsunarherinum í Vági. Øll, ið vilja gleða diamantbrúðarparið eru vælkomin.

# 13-tal fyri verkætlan

**Mikumorgunin 23. november vóru vit ein túr á Venjingarskúlanum. Vit tosaðu við tær báðar Doris Helenu Olsen og Paulu Rasmussen, sum báðar fingu 13 tal fyri verklætlanina**

VERKÆTLAN
*Lena R. Guttesen*

Í vikuni 14. nov. til 18. nov. hevði 9. B á Venjingarskúlanum verkætlanar viku. Tær báðar Doris Helena Olsen og Paula Rasmussen høvdu valt at vera í bólki saman. Vegna tað at Paula skuldi ørindi í Danmark frá sunnudegnum 13. nov. og líka til hóskvøldið 17. nov. og Doris skuldi framføra sjónleik hvørt kvøld, høvdu tær lagt eina ætlan fyri arbeiði í góðari tíð.

Høvuðsevnið hjá flokkinum var Føroyar. Av tí at mangir sjómenn eru í Føroyum, og at tær sjálvar hava familju, ið er á sjónum, høvdu tær valt sær sjómenn sum evni. Eitt breitt evni, men tær avmarkaðu tað við undirspurningum, ið ljóðaðu soleiðis. Hvat er munurin á farmaskipum og fiskiskipum? Hvussu hevur ein sjómannafamilja tað? Og hvussu nógvur fiskur verður útfluttur?

Sjálvar søgdu tær, at vikan var eitt kaos. Tær arbeiddu hvønn dag frá 15-18, áðrenn verkætlanarvikan byrjaði, og søgdu seg ikki hava klárað at gjørt seg lidnar, um tær ikki vóru byrjaðar í góðari tíð. Paula kom aftur, bert ein dag áðrenn framløguna, og beinanvegin var farið til verka. Tær gjørdu tí síðstu samrøðuna og sótu uppi alla náttina og skrivaðu ta skrivligu uppgávuna. Og so var klárt og latið inn. Framløgan var tann 21. nov. Tær høvdu fingið tilfarð frá Gummubátatænastuni og Vónini at pynta stovuna við, og meðan dias-show var á stórskýggja, hoyrdist alduljóð aftanfyri. Á ymsan hátt høvdu tær so fingið svar uppá allar spurningarnar tær settu. Aftaná framløguna var pinnamatur við rækjum at fáa. Serliga vóru tað læraranir, ið høvdu stóran áhuga í framløguni, men av tí at tær høvdu gjørt framløguna so lívliga, gjørdist evnið alt meira hugvekjandi hjá næmingunum. Læraranir vóru serliga bergtiknir av, at tær høvdu klára seg so væl, av tí Paula hevði verið burturstødd meginpartin av vikuni. Teir góðu teimum so eitt 13 tal fyri framúr gott og vælskipað arbeiði.



*Doris Helena Olsen og Paula Rasmussen, sum báðar fingu 13-tal fyri verkætlanina*

Reaktiónin fyri 13 talið var nakað serligt. Tær høvdu als ikki havt tankar um so góðan karakter, men hildu sjálvar at framløgan gekk betur enn vænta. Vit gjørdust sera glaðar, men nú følir man seg sum ein stemplaðan nørd í flokkinum, sigur Paula at enda við einum smíli.

# Vestmanna kirkjukór adventshugna í kirkjuni

TÍÐINDASKRIV

Sunnudagin tann 27. nov. kl.18.00, sum eisini er fysti sunnudagur í advent, skipar Vestmanna Kirkjukór saman við Vestmanna Kirkju fyri adventshugna í Vestmanna kirkju.

Kirkjukórið, hevur nú í fleiri ár skipað fyri hesi hugnaløtu, í auluni í Vestmanna skúla, men nú kirkjan er umbygd verður hugnaløtan í kirkjuni.

Á skránni verður røða, tónleikur, kórsangur og felagsangur o,a.

Olav Enomoto løgtingsmaður kemur at siga nøkur orð, Pauli Magnussen og Jógvan Toftum koma at spæla undir til kórsangin og felagssangin.

Gestasangarar verða Kollfirðingurin Jens Marni Hansen og Hannis Hansen



úr Fuglafirði, teir fara at synga nøkur løg saman við kirkjukórinum.

Vestmanna Kirkjukór, sum telur uml. 40 fólk og er undir leiðslu av Erlu Olsen, kemur eisini at framføra nakrar sangir.

Hini árini hevur aulan verði meir enn full, og tí verður heita á fólk, um at møta stundusliga til hugnaløtuna í krikjuni.

Aftaná sangin í sjávari kirkjuni er smyrjubreyð í kirkjukjallaranum.

Tiltakið er heilt ókeypis, men fólk kunnu eins og seinast lata eitt oyra til Vestmanna Kirkjukór.

Øll eru vælkomin.

**Dagurin í morgin**

**25. november. Katrin**, deyð umleið ár 300. Halgisøgurnar greiða frá eini vakrari og klókari prinsessu í Aleksandriu, sum mangir hábornir menn bóðu um, líka keisarin. Men hon vildi ongum játtast, tí at Kristus var hennara sanni brúðgómur. Hon viðgekk alment kristnu trúgv sína og varð tikin av døgum. Hon varð jarðað á Sinaifjalli, har eitt katrinarkleystur er bygt yvir grøv hennara. Navnið er grikst og merkir *hin reina, hin óspilta.*